# Verkfrøðingur

Kundi tú hugsa tær - í einum áhugaverdum og fjølbroyttum starvi – sambært galdandi krøvum og reglugerðum - at verið við til m.a.:

við rætta hitanum og røttu ventilatiónini at tryggja eitt gott inniumhvørvi í skúlum, skrivstovum, handilsmiðstøðum, verkstøðum, ítróttahallum, svimjihallum og røktarheimum.

í vatnveitingarætlanum at tryggja kravdu góðskuna á drekkivatni við vatntøkum, goymslum, reinsiverkum, UV-útgerð; í svimjihyljum og uppvenjingarhyljum við røttu útgerðini at tryggja bakteriologiskt og evnafrøðiliga reint vatn.

at bøta um náttúruumhvørvið við nýgerð av kloakkum og reinsiverkum, skipaðum tyrvingarplássum v.m.

so ert tú kanska rætti persónurin, vit sóknast eftir.



Førleikakrøv:

Maskin- ella bygningsverkfrøðingur ella líknandi útbúgving.
Hollan kunnleika til og royndir í nýtslu av vanligu Microsoft forritunum og AutoCAD. Helst eisini Architectural Desktop/ Building Systems.
Kring/ur í føroyskum, donskum og enskum máli.
Hevur góð samstarvsevnir og dugir at arbeiða sjálvstøðugt.
Roynd á fleiri av nevndu økjum er ein fyrimunur.

Send eina umsókn saman við viðkomandi skjølum innan 14. juli 2006. Nærri upplýsingar fáast við at venda sær til Martin Erik Leo (211488).

**Martin E. Leo Sp/f**
Ráðgevandi verkfrøðingar og Lloyd's Surveyor
tlf. 311488 fax 315488 martin@mel.
Tórsgøta 24 100 Tórshavn

SUNSET Boulevard

# Starvsfólk

TIL SUNSET BOULEVARD Í SMS

## Fullatíð

Søkt verður eftir fólki M/K í aldrinum 17 ár og eldri til at arbeiða fullatíð – at byrja skjótast tilber. Ert tú opin, virkin, røkin og dámar tær væl at arbeiða, har tað veruliga hendir nakað, so er hetta tað. Arbeiðstíðirnar eru skiftandi og liggja millum kl. 08.00 og 21.00. Tað ger onki, um tú hevur hóskandi royndir. Vit seta teg inn í okkara arbeiðsmannagongdir, og eftir hetta kanst tú gerast eitt av álitisstarvsfólkum okkara.
Vit gleða okkum til at hoyra frá tær...

**Send umsóknina til:**
Sunset Boulevard, SMS, Postboks 1059, 110 Tórshavn,
ella far inn á www.sms.fo og útfyll eitt umsóknarskjal.

Sig tína meining
í Sosialinum



# Børn, sum spæla uppá eitthvørt ljóðføri, læra skjótari mál, og minnast betur.

Hugsa um hetta, meðan vit hugsa um teg.

REPROZ

Sethúsatrygd, familjutrygd, vanlukkutrygd, biltrygd, ferðatrygd. Vit geva tær bestu ráðini, finna bestu loysnina, nøkta tín tørv. Vit hugsa um tryggingar. Hugsa tú bara um alt møguligt annað.

RING 35 81 00 ELLA VITJA WWW.TRYGD.FO

TRYGD
hugsar um teg.